## Føroysk fitness-video



Uttan at sveitta er heitið á nýggjum føroyskum fitness-sjónbandið, sum nú verður sent á marknaðin. Konseptið handan sjónbandið eigur Kristian Ludvík Dam, sum er útbúgvin fitness-venjari, og sum hevur sett sína egnu venjingarskrá saman. Filmurin hevur 14 venjingar, ið taka góðar 50 minuttir at gera - um tú gert alt í einum. Upptøkurnar eru gjørdar úti í Grøv í Klaksvík.

## Hálv milliard meira í lønum

Seinasta uppgerðin frá Hagstovuni vísir, at longu nú eru 479 mió kr. fleiri goldnar út í lønum í Føroyum, enn talan var um alt 2006. Størsti vøksturin er í privatu tænastuvinnuni, har lønarútgjaldingarnar eru øktar 13%, men eisini byggivinna og onnur tilvirking hevur havt stóran vøkstur. Minsti vøksturin er innan fiskivinnu, har økingin er 2%.

# ingardepil í Havn



*Her fæst so ein heildarmynd av øllum tí 40.000 fermetra stóra upplivingarmiðdeplinum. Alt samalt verður samanbundið við eini innandura gongugøtu*



*Her fæst ein mynd av, hvussu allur upplivingardepilin á Hálsi fer at síggja út. Hetta skal vera eitt vørumerki fyri Havnina, sigur stigtakarin, Mads Andrias Winther. Longst til vinstru er luksushotellið og í Hamrinum undir hotellinum verður vælverumiðstøð, svimjihøll og venjingarmiðstøð. So skuldi hugurin verið til at ligið í gosbaði ella hugna sær í vælverumiðstøðini við frálíkum útsýni yvir Nólsoyarfjørð, verður tað ein møguleiki um stutta tíð*

ans skal kunna bera til at halda feriu og fáa alt, sum tørvur verður á, uttan so mikið sum at noyðast at fara útum.

### Stórur áhugi at fíggja

Mads Andrias Winther sigur, at sjálvandi fara teir ikki undir eina slíka ætlan uttan at hava trygd fyri fíggingini.

- Vit hava fígging í rygginum og bæði í Føroyum og uttanlands er stórur áhugi hjá íleggjarum at vera við í ætlanini, sigur Mads Andrias Winther.

Annars vil hann ikki siga, hvussu nógv hetta kostar, tí hetta veldst um, hvørjar tillagingar verða gjørdar á vegnum.

Men talan verður so um nakrar hundrað milliónir, ásannar hann.

Hann leggur afturat, at teir hava havt samskifti við Býráðið og har var avgjørt vælvild mótvegis ætlanini.

Í næstum fara tey at fyrireika verkætlanina so at tað verður klárt at søkja býráðið um byggiloyvi og hann væntar, at tað verður innanfyri eitt ár.



*Og soleiðis sær alt út norðaneftir. Hotellið verður ein sermerktur, stásiligur, svartur bygningur við nógvum glasi og í hamrinum undir hotellinum eru svimjihøll og miðstøð til vælveru og kropsvenjing*